

## Nýggjur fiskimálaráðharri

Tá íslendingar fingu nýggja stjórn seinnapartin í gjár, fingu teir samstundis ein nýggjan ráðharra at umsita fiskivinnu- og landbúnaðarmál. Nýggi ráðharrin eitur Jón Bjarnason. Hann er úr Vinstrafylkingini og er valdur í Altingiðum umboð fyri Norðvesturvaldømið. Jón Bjarnason er føddur í Strandnessýslu annan jóladag í 1943 og er sostatt 65 ára gamal. Hann hevur útbúgvið seg innan landbúnað í Íslandi og Noregi og tók prógv sum landbúnaðarfrøðingur í Noregi í 1970. Í 2003 varð hann valdur í Altingið og hevur verið formaður í tingbólkinum hjá Vinstrafylkingini.

## Ferðamannaskip á land

Tey umleið 550 ferðafólkini, sum eru á rundferð við ferðamannaskipinum "Zenith", fingu ein heldur longri steðg í Keypmannahavn um vikuskiftið enn upprunaliga ætlað. Orsøkin var, at skipið sigldi á eitt sandriv nakað iuttan fyri havnina í Keypmannahavn, tá tað skuldi fara avstaðaftur. Tað eydnaðist at fáa skipið leyst, og kanningar vístu, at tað hevði ikki fingið skaða. Men áðrenn "Zenith" slapp at halda ferðinha fram, fekk skiparin at vita, at hann fær bót fyri óansni. "Zenith", sum siglir undir maltesiskum flaggi, fór úr Keypmannahavn til Gdansk í Póllandi.

# - Vit fara til verka við góðu

**Í røðu síni við hátíðarløtuna, tá nýggja Norðborg kom á Klaksvík, vísti Kristian Martin Rasmussen, reiðari, á, hvussu umráðandi tað er, at vit gagnnýta tilfeingið so væl sum tilber. - Vit vænta, at vit við hesum skipi kunnu heysta rættari, enn vit hava gjørt, segði hann**

NORÐBORG
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Kristian Martin Rasmussen saman við borgarstjóranum, Gunvá við Keldu, synum og abbasynum*
*Mynd: Dávur Winther*

Um 14-tíðina fríggjadagin, Dýra biðidag, stevndi nýbygningurin Norðborg, sum Kristian Martin Rasmussen og synir hansara hava latið smíða í Chili, inn á Klaksvík. Bátar fylgdu skipinum inneftir vánni, og tá tú í bili nærkaðist norðurpartinum av Klaksvíkini, sást skjótt, at áhugin fyri at taka ímóti nýggja og stásiliga skipinum var ógvuliga stórur.

Fólk í bili og fólk til gongu stevndu norðureftir móti norðurhavnini, sum klaksvíkingar rópa nýggju havnina í Ánunum.

Trongt var á vegnum og nøgvu bilarnir, sum vóru á veg norðureftir, máttu næstan laga seg eftir hvørjum øðrum - og eftir fólki, sum vóru til gongu.

Hesa løtuna gekk øll ferðslan í Klaksvík norður gjøgnum býin og norður í Ánir.

Skipað varð fyri stórum hátíðarhaldi, bæði við hornatónleiki og sangi, sum sangbólkurin Suð syrgdi fyri.

Tá borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu, Gunvá við Keldu, hevði hildið sína røðu, segði reiðarin, Kristian Martin Rasmussen, sum

# Væleydnaður bátafestivalur á Toftum



*Ársins fyrsti bátafestivalur eydnaðist væl, og næsta leygardag verður aftur bátafestivalur í Vestmanna*
*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

**Hóast veðurvánirnar ikki vóru av teimum allarbestu til bátafestivalin á Toftum leygardagin, vóru nógvir bátar við, tá samanum kom – og veðrið royndist rímiliga væl**

TOFTIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Um 15-tíðina leygardagin stevndu út við áttati bátar inn í deksbátahavnina í Oyrunum á Toftum. Góður og undirhaldandi harmonikutónleikur ljómaði hesa løtu, og tá bátarnir vóru bundnir við bryggjuna, vórðu allar bátsmanningarnar bjóðaðar út í matarhøllina hjá Faroe Seafood (Nyki) til feska suppu og okkurt leskandi.

Seinnapartin leygardagin og leygarkvøldið undirhildu teir tríggir, Sámal Ravnsfjall, Hallur Joensen og Martin Joensen, á palli.

Væl av fólki var til ymisku tiltøkini, sum vóru á skránni, bæði seinnapartin leygardagin, leygarkvøldið – og ikki minst eydnaðist dansurin í tjaldinum, har